## Asfalt – eisini ein sigur fyri stríðið móti vápnum

Amnesty International savnaði inn 300 andlitsmyndir á Asfalt, sum partur av Control Arms mótmælinum. Við hesum er talið á andlitum, ið Føroya deildin hjá Amnesty International hevur savnað inn, komið upp á 1000 myndir.

Amnesty International er í løtuni í ferð við átakið Control Arms, ið hevur til endamáls at fáa ein ST-sáttmála um altjóða vápnaeftirlit samtyktan. Í hesum sambandi fór Føroya deild felagsins í samstarv við Asfalt.

Control Arms átakið er øðrvísi enn onnur átøk, her vera andlitsmyndir savnaðar inn í staðin fyri undirskriftir. Ætlanin er, at í minsta lagi ein millión menniskju skulu vísa sítt andlit til frama fyri, at ST-sáttmálin verður samtyktur. 1500 av hesum andlitamyndum skulu koma úr Føroyum. Áður hevur Amnesty savnað myndir inn á konsert í Margarinfabrikkini og tá Norðoyartunnilin lat upp. Á asfalt fara umboð frá Amnesty at vera á staðnum og taka myndir.

**nud**

## Braquet slapp við á Cornerstone Festivalin

Í sambandi við konsertferð sína í USA, luttók Braquet í eini kapping um at spæla á Cornerstone Festivalinum beint uttan fyri Chicago, sum eitur New Band Showcase, føroyski bólkurin megnaði at gerast nummar 5. Teir 16 fremstu bólkarnir sluppu at spæla á festivalinum.

5. plássi merkir at Braquet sleppur at spæla tvær konsertir á festivalinum.

Kappingin varð avgjørd við atkvøðum á alnetsíðuni hjá festivalinum. Sum vanligt vóru føroyingar trúgvir at stuðla sínum, og nógv atkvøddu fyri Braquet fyrstu tíðina, einu tíðina lá bólkurin á fjórða plássi, men datt síðan spakuliga niður á 12 pláss.

**nud**

# Anytime á Jóansøkufestivalinum

**Brandur Enni og bólkur hansara Anytime verður millum nøvnini á ársins Jóansøkufestivali, ið verður hildin í Vági í ár**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Jóansøkufestivalurin byrjar alt meira at taka skap og festivalurin kunnger í dag, at Anytime við Brandi Enni verur á skránni hjá festivalinum við sínum popp rokki.

Brandur Enni er farin frá støðuni sum barnastjørna til at vera oddamaður í einum bólki, ið spælir hansara løg. Bólkurin varð stovnaður í fjør, tá Brandur var liðugur í fólkaskúlanum og saman við nøkrum vinmonnum avgjørdi at stovna ein bólk. Bólkur luttók á Asfalt síðsta vikuskiftið, og sambært ummælaranum hjá Dimmu, var konsertin sera góð. Brandur hevur seinasta árið verið fleiri ferðir í Svøríki og smíðað nýggjar sangir í samstarrið við ymiskum kendum sangskrivarum.

Anytime er: Brandur Enni, sang, gittar, trompet og kornett, Leivur Samuelsen, trummur, Bárður Poulsen, bass, Sveinur Dam, el-gittar, Heini Ragnarson, trompet og Jákup Wardum, klaver.

Jóansøkufestivalurin hevur avdúka stóran part av skránni til festivalin, men nú tríggjar vikur eru eftir til festivalurin fer av bakkastokki, eru enn eini 5-6 nøvn eftir at kunngera, sigur Dennis Holm fyriskipari.

Higartil hevur Jóansøkufestivalurin kunngjørt hesi trettan nøvnini: Andrew Strong, Carpark North, Páll Finnur Páll, Thorbjørn Risager: Blue 7, Den Danske Mafia, Land og Synir, Deja Vu, Gogo Blues, Maria Guttesen, Rasmus Lyberth, 200, Robert og Vinmenn og Anytime.

# Tónlistarligur gandakallur á Norðurbryggjuni



*Mugison er sera torførur at seta í bás*

**G! aktuelli Mugison spældi fyrstu konsertina á Havne Scenen í Keypmannahavn í ár, og vísti at Norðurbryggjan hevur møguleika fyri at víðka um virksemi sítt**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mugison á konsert er ein spennandi uppliving, ið er torfør at seta í bás. Hósdagin spældi íslendski tónlistarligi gandakallurin Mugison á einum flótipalli við Norðurbryggjuna í Keypmannahavn, og hóast skiftandi veður var upplivingin frálík.

Tey flestu, ið høvdu leitað sær á bryggjuna vóru íslendingar, men onkur føroyingur var ímillum tey nøkur hundrað fólkini, ið vóru savnaði á bryggjuni. Planet.fo var framvið eina løtu, og vit upplivdu góðan stemning, sól, regn og eitt slag av tónleiki, ið er heilt egið – ella okkurt heilt annað.

Mugison og tónleikararnir hjá honum á bassi og trummum høvdu ein óvanliga respektleysan máta at ferðast innan tónleikagreinar, eina løtu minti tað mest um blús, síðan um kontri, síðan um rokk og enntá tung málm, alt í einum lagi. Mugison hevur stutt sagt onga respekt fyri reglum, um hvussu tú skalt ljóða ella ikki ljóða. Hetta var fríksligt og fekk tankarnar at leita til sovorðnar tónlistarligar úrmælingar sum Beck Hansen. Tað er eingin ivi um, at tey, ið ætla sær á G! Festivalin hava nakað heilt serligt at gleða seg til.

Hetta var fyrstu ferð, at Norðurbryggjan tók Havnescenen, ið flótipallurin eitur, í nýtslu og hetta var væl eydna, tað er ikki ringt at ímynda sær Eivør ella Teitur við bólki á hesum palli, ella kanska tey bæði, ein heitan summar dag.

# Eyðgunn Samuelsen formaður í kvinnupolitisku nevndini

**Nevndin viðvíkjandi øktum kvinnuleikluti í politikki hevur skipað seg**

POLITIKKUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@kallnet.fo*

Eyðgunn Samuelsen í Klaksvík er vald til formann í nevndini, sum skal virka fyri, at fleiri kvinnur verða við, har politisku avgerðirnar verða tiknar.

Næstformaður er Annleyg Lamhauge í Tórshavn.

Eyðgunn umboðar Javnaðarflokkin í nevdini og hevur drúgvar royndir í kommunalpolitikki.

Annleyg var eitt skifti skrivari hjá tingbólki Sjálvstýrisfloksins. Síðani september 2004 hevur hon verið við í tvørpolitiska kvinnubólkinum, sum hevur arbeitt við upplýsandi tiltøkum fyri kvinnur við áhuga í politikki.

Hini í nevndini eru:

Rósa Samuelsen fyri Sambandsflokkin, Inga Dahl fyri Fólkaflokkin, Sólfríð Fjallsbak fyri Tjóðveldisflokkin, Hjørdis Háberg Petersen fyri Miðflokkin, Kári á Rógvi fyri Javnstøðunevndina, Bergtóra Hanusardóttir fyri Kvinnufelagið, Eyðun Christiansen fyri Føroya Kommunufelag og Steinbjørn Jacobsen fyri Kommunu Samskipan Føroya

Tá nevndin varð sett, 1. januar 2006, fekk hon tvey ár at arbeiða í. Men broytingar máttu gerast í vali av nevndarlimum. Tískil er nærum eitt hálvt ár farið av arbeiðstíðini hjá nevndini, uttan at nakað er gjørt.

Eyðgunn Samuelsen vísir á, at peningurin, ið avsettur er til arbeiðið hjá nevndini er 150 krónur hvørt árið.

– Fyri hesa upphædd fæst lítið av skafti, og ætlar nevndin at søkja um hægri játtan komandi fíggjarár, sigur hon.

Nevndin hevði fund týsdagin 6. juni.

Á næsta fundi, sum verður tann 8. august, er ætlanin at hava hugarok, har allir limirnir leggja fram síni hjartamál og hugskot.



*Eyðgunn Samuelsen*